


BÓKHALD · SKULDARARØKT · RÁÐGEVING · SKATTAUPPGERÐ



Vit hava økt um okkara starvsfólkahóp og kunnu tí aftur taka ímóti nýggjum kundum.

Sp/f RannTeld hevur sera drúgvar royndir innan roknskap, bókhald, skuldara- og ognararøkt, MVG- og skattauppgerðir, ráðgeving og líknandi.

Vit hava orð á okkum fyri at vera nærløgd og góð í ráðum, – og prísirnir eru sera rímuligir!

Hava tygum tørv á hjálp innan omanfyri nevndu økir, eru tygum vælkomin at ringja ella at støkka inn á gólvið til eitt óbindandi prát og/ella ein góðan drekkamunn!

bókhaldsvirkið RannTeld

Bókhaldsvirkið við Atla Klein Olsen

Sosialurin / KvR 34 18 00

www.taks.fo

TAKS

## Starvsfólk til Vinnusjúkugrunnin

**Vinnusjúkugrunnurin hevur** sum endamál at fíggja og rinda endurgjald fyri vinnusjúkur. Allir arbeiðsgevarar, teirra millum land, kommunur og sjálvstøðugt vinnurekandi, skulu rinda gjald til Vinnusjúkugrunnin.

**Talan er** um eitt fulltíðarstarv í Vinnusjúkugrunninum at byrja 1. mars 2010. Grunnurin verður umsitin á TAKS á Tvøroyri.

**Vit leita** eftir einum fólki, sum m.a. skal taka sær av arbeiðinum við innheintingini av gjaldinum, sum arbeiðsgevarar skulu gjalda til Vinnusjúkugrunnin.

Um so er, at nýggjar ella broyttar uppgávur verða álagdar eindini, skal viðkomandi vera fúsur at taka sær av teimum og skal umframt kunna tillaga seg lógarbroytingum og umstøðum annars.

**Tann, sum** settur verður, skal hava skrivstovuútbúgving e.l., hava roknskaparligan kunnleika og royndir innan bókhald, vera arbeiðssamur, fyrikomandi og duga væl at leggja arbeiðið til rættis. Stórur dentur verður lagdur á, at viðkomandi arbeiðir sjálvstøðugt, er vanur við at arbeiða við teldu og er førur fyri at mynda avgerðir í dagliga arbeiðinum.

**Vit kunnu bjóða**
- Eitt spennandi og avbjóðandi starv við nógvum og fjølbroyttum uppgávum.
- Flextíð
- Eitt sjálvstøðugt starv í góðum arbeiðsumhvørvi

**Starvið verður** sett eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarandi yrkisfelag.

**Setanarøkið** er TAKS á Tvøroyri, men umfatar Fíggjarmálaráðið og stovnar undir tí.

**Meira fæst** at vita um starvið við at venda sær til Margret Joensen, stjóra á TAKS á Tvøroyri, á telefon 352600.

**Send umsókn** saman við avritum av prógvum, ummælum og CV til TAKS í seinasta lagi **1. februar 2010.**
Merkt: Umsókn Vinnusjúkugrunnurin

**T-postur:** taks@taks.fo ella **Postadressa:** TAKS · Postsmoga 2151 · FO-165 Argir

**TAKS** er ein stovnur undir Fíggjarmálaráðnum, hvørs uppgáva er at umsita toll- og avgjaldsskattalóggávuna og innheintingar innan málsøkini hjá stovninum. **TAKS** hevur 140 starvsfólk og er skipað við einari høvuðseind á Argjum og trimum skrivstovueindum runt landið.

Nýtt frá MATRIX
– vistfrøðiligt




Sosialurin / KvR 34 18 00

Torfinsgøta 6
Telefon 31 47 68
FO-100 Tórshavn

Salong Liljan




# GASTRONOMISKUR KOKKANÆMINGUR TIL NORRÖNU

Søkt verður eftir gastronomiskum kokkanæmingi til galluna umborð á Norrönu at byrja skjótast gjørligt.

Smyril Line bjóðar áhugavert og avbjóðandi læurupláss sum gastronomiskur kokkur í einum altjóða umhvørvi. Lærutíðin er 3 ár og 9 mánaðar. 47 vikur av lærutíðini er á skúla í Aalborg, harav 20 vikur eru grundskeið.

**Vit vænta, at tú:**
- ert kreativur, lagaligur og hevur ábyrgdarkenslu
- hevur hug og evni at arbeiða saman við øðrum
- kanst arbeiða sjálvstøðugt
- ert fleksibul og hevur gott sinnalag

**Vit bjóða:**
- eitt spennandi og krevjandi starv á einum stórum og fjølbroyttum arbeiðsplássi
- góðar umstøður og gott arbeiðsumhvørvið
- góðar møguleikar fyri persónligari og fakligari menning
- arbeið og frítíð í lutfallinum 1 til 1

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður lønt sambært galdandi sáttmála.

Størvini verða sett skjótast gjørligt, men vit bíða fegin eftir tí rætta. Umsøkjarar, ið hava lokið grundskeið innan kokkafakið, hava fyrimun. Lærutíðin verður í hesum sambandi stytt við 20 vikum.

Umsóknir og CV skulu sendast við telduposti til hesa tilskrift innan mánadag 1. februar:

chef.manager@norrona.fo
Tel. 344850 / 344835

Smyril Line varð stovnað í 1982, og er í dag ein altjóða fyritøka við skrivstovum í Føroyum, Íslandi, Týsklandi og Danmark. Umframt egnar skrivstovur, hevur felagið eisini aðalsøluumboð í Bretlandi, Beligu, Fraklandi, Hollandi, Italiu, Pólandi og Svøriki. Smyril Line hevur eisini tætt samstarv við samstarvsfelagar í meginpartinum av evropeiska meginlandinum og restini av útheiminum.

SMYRIL LINE · YVIRI VIÐ STROND 1 · POSTBOKS 370 · FO-110 TÓRSHAVN
TLF 34 59 00 · FAX 34 59 50 · OFFICE@SMYRIL-LINE.FO · WWW.SMYRIL-LINE.FO